# Miðlamjørr

Vit nýtast onga fólkateljing, allar upplýsingarnar eru á Facebook
***Maður, 45 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



*Internetið er síðsti frístaður okkara, og eg vóni, at soleiðis verður frameftir*

Olav Enomoto í sambandi við ætlan hjá løgtinginum at sperra heimasíðu, sum kappast um tipping við Danske Spil

**Ynski Saltsiloini góða eydnu og tillukku. Útjaðarin skal eisini hava, og har veit ein, hvat peningurin verður brúktir til.**
***Maður, 38 ár***



*I want to f*** you!*

Sangarin í danska bólkinum A Friend In London rópar beint í upptøkutólið undir Grand Prixnum, sum verður sent til hundraðtals milliónir fólk kring Europa



*Um nøkur fá ár kann Mykines sum ferðamál verða líka slitið sum grísaveitslan á Mallorka*

Landsstýriskvinnan Annika Olsen heldur, at føroyingar skulu vísa náttúruni ans, seta krøv og taka pengar frá ferðafólki

**Orðaskiftið í gjár um sterkt øl er nakað av tí mest undirhaldandi, eg leingi havi sæð í sjónvarpinum. Eg sat eftir við spurninginum: Tá vit framleiddu wc-pappír, kukkaðu vit tá meir?**
***Kvinna, 41 ár***

**»Men maaaaaamma, tað eru knappar á fartelefonini!« (Tann 7,5 ára gamla tá eg gevi henni eina nýggja fartelefon at nýta í neyðstøðum). Sukk dagsins ungu!**
***Kvinna, 40 ár***

*Skal skipanin virka, krevur hetta, at fyrisitingin er búgvin at viðurkenna møguleikar feilir og rætta teir*

Løgfrøðingurin Johnhard Klettheyggj á ráðstevnu um Løgtingsins Umboðsmann (Sosialurin)





*Lívið er ein ferð – ikki eitt ferðamál*

Rocksangarin Steven Tyler



*Um tú elskar onkran, sita tað so við viðkomandi í dag. Eingin veit, um vit fáa ein dag afturat*

Songkvinnan Jennifer Lopez gevur góð ráð